# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Kemur Karadzic fyri rættin í Haag, eiga fleiri vesturlendskir leiðarar at sita undir liðini á honum*

*(russiski ST-sendimaðurin)*

# Nú stríðist hann ímóti útflýggjan

**Radovan Karadzic fer at gera alt fyri at sleppa undan at verða sendur til Haag**

Krígsbrotsmannadómstólurin krevur, at serbisku myndugleikarnir skulu senda Radovan Karadzic til Haag, so hann kann koma fyri rættin, har hann er ákærdur fyri fólkamorð og onnur krígsbrotsverk.

Ein serbiskur kanningardómari hevur avhoyrt Karadzic, og aftan á avhoyringarnar gjørdi ein dómstólur av, at tann 63 ára gamli fyrrverandi bosniaserbiski leiðarin skal flýggjast dómstólinum í Haag.

Verjin hjá Karadzic, Svetozar Vujacic, hevur boðað frá, at hann fer at kæra avgerðina. Sambært BBC hevur verjin sagt, at hann fer at gera alt fyri at forða fyri, at Karadzic verður sendur til Haag.

Í gjárkvøldið vóru nøkur hundrað fólk komin saman á torginum í miðbýnum í Beograd. Tey róptu rakstrarróp eftir myndugleikunum og søgdu, at Radovan Karadzic skal ikki til Haag.

– Karadzic er ikki ein brotsmaður. Hann er ein hetja, róptu tey.



*Soleiðis sá Radovan Karadzic út, tá hann bleiv avhoyrdur í gjár*
*(Mynd: Polfoto)*

## Hann er tann evropeiski bin Laden

**Fyrrverandi amerikanski diplomaturin og semingsmaðurin Richard Holbrooke samanber Radovan Karadzic við yvirgangsleiðaran Osama bin Laden**

– Hetta vóru góð tíðindi at fáa. Hann er tann ringasti í Evropa, tann evropeiski bin Laden. Í 13 ár kláraði hann at fjala seg, men nú gekk tað tíbetur ikki longur, sigur Richard Holbrooke, sum heldur, at Karadzic er ein størri brotsmaður enn Slobodan Milosevic.

– Hann var tann fremsti arkitekturin aftan fyri ta etnisku útreinskanina. Í mínum eygum var hann verri enn Milosevic, forseti, sigur fyrrverandi diplomaturin, sum eitt skifti var amerikanskur semingsmaður á Balkan. Richard Holbrooke er samdur við teimum, sum siga, at við handtøkuni hevur Serbia tikið eitt týðandi stig nærri Vesturheiminum. Men okkurt er eftir.

– Ratko Mladic, generalur, gongur leysur enn, men tað var týdningarmeiri at fáa fatur á Karadzic, tí hann var tann veruligi upphavsmaðurin til fólkamorðið, sigur Holbrooke við Reuters.



*Richard Holbrooke var semingsmaður á Balkan eitt skifti (Mynd: Polfoto)*



*Sum ST-sendimaður í gamla Jugoslavia hitti Thorvald Stoltenberg eisini Slobodan Milosevic (Mynd: Polfoto)*

## Stoltenberg hevur bíðað eftir handtøkuni

**Norðmaðurin Thorvald Stoltenberg, sum var ST-sendimaður í Jugoslavia frá 1993 til 1995, hevur alla tíðina væntað, at Karadzic fór at verða tikin**

Fyrrverandi Balkan-semingsmaðurin Thorvald Stoltenberg viðgongur, at hann varð fegin, tá hann fekk tíðindini um, at Radovan Karadzic var tikin.

– Eg eri sera fegin um, at hann er tikin, men tað undrar meg ikki, at tað eydnaðist. Eg visti, at hann fór at verða tikin fyrr ella seinni. Tað havi eg verið sannførdur um líka síðani 1995, sigur Stoltenberg við NTB.

Thorvald Stoltenberg var serligur ST-sendimaður og friðarsemingsmaður á Balkan í árunum frá 1993 til 1995. Men hóast hann hevur bíðað eftir handtøkuni í 13 ár, hevur hann ikki hildið, at tað hevði skund at finna Karadzic.

– Nei, eg havi ongantíð hildið, at tað hevði skund. Høvdu vit roynt at taka hann fyrr, hevði tað kanska kostað mannalív. Eg havi fyrr sagt, at hansara egnu fóru at taka hann og at senda hann til Haag, sigur tann gamli, norski friðarsemingsmaðurin.

Hann sigur við NTB, at handtøkan í Beograd er ein sigur fyri ta politisku skipanina í Serbia og altjóða krígsbrotsmannadómstólin.

**STUTT SAGT**

### Maoistar ikki í stjórn

Hóast maoistarnir hava flest umboð í nepalska tjóðartinginum, verður flokkur teirra ikki við í teirri nýggju stjórnarsamgonguni. Eygleiðarar høvdu væntað, at maoistarnir skuldu vera við í stjórnini, men teir valdu at halda seg uttanfyri og at fara í andstøðu, tá teirra valevni, Ramraja Prasan Singh, tapti forsetavalið í tjóðartinginum fyrradagin.

Politiskir eygleiðarar í Asia siga, at avgerðin hjá maoistunum at fara í andstøðu fer helst at elva til stjórnarkreppu í Nepal. Eygleiðararnir vísa á, at avgerðin hjá maoistunum ger, at Nepal skal stýrast av flokkum, sum hava ymisk sjónarmið, og tað er sjáldan heppið.

Ramraja Prasan Singh tapti forsetavalið ímóti valevninum hjá Framburðsflokkinum, Ram Baran Yadav, við 282 atkvøðum ímóti 308.



*Ramraja Prasan Singh tapti*
*(Mynd: AP)*

### Ólafur til Kína

Íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, hevur fingið innbjóðing frá kinesiska forsetanum, Hu Jintao, og íslendska ítróttarsambandinum at fara til olympisku summarleikirnar, sum verða í Beijing í næsta mánað. Íslendsku bløðini skriva, at forsetin kemur til Kina tann 21. august, og at hann verður hjástaddur, tá leikirnir enda tann 24. august.

Tá teir olympisku leikirnir eru lidnir, fer Ólafur Ragnar Grímsson til Bangladesh, har hann skal vitja Iajuddin Ahmed, forseta. Høvuðsevnið á fundinum teirra millum verða avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum.



*Ólafur Ragnar Grímsson er íslendskur forseti*
*(Mynd: Vísir)*